FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

VITAN ER PALLURIN FORVITNI ER DRÍVMEGIN

# Fjølbroytni í orðalag í føroyskum

Zakaris Svabo Hansen
Føroyamálsdeildin
Fróðskaparsetur Føroya

Vísindavøkan
25. september 2015

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

- Málið okkara trúgvi fylgisneyti
- Amboðið í gerandisdegnum
- Heima við hús, í frítíðini
- Í samfelagslívinum – til arbeiðis, í skúla o.s.fr.

- Hóast vit hava eitt mál
- er málið fjølbroytt og skiftir eftir
- hvaðan úr landinum vit eru
- aldri: munur millum ung og tilkomin
- sosialari støðu, útbúgving o.s.fr.

- Vit eru heldur ikki tey somu málsliga í øllum lívsins viðurskiftum
- Brúka onnur orð og annað orðalag heima við hús við tey vit kenna
- enn úti alment við fólk vit ikki kenna so væl

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Málsligt fjølbroytni í føroyskum

- Hugsa vanliga serliga um munir í tí ljóðliga, at framburðurin er ymiskur kring landið
- Men eg fari her at umrøða eina variatión, sum vit vanliga ikki hugsa so nógv um
- Tað snýr seg um mun í orðarað í noktandi høvuðs- og eykasetningum

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# Hví er tað áhugavert?

- Tað er tað, m.a. tí at føroyskt her víkur frá grannamálunum
- Øðrumegin stendur íslendskt við sama orðarað í høvuðs- og eykasetningi:
- Høvuðssetningur: Elín hefur ekki lesið þetta bréf
- Eykasetningur: Þetta er bréfið sem Elín hefur ekki lesið
- Vit hava raðfylgjuna hefur+ekki í báðum førum

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Hinumegin stendur danskt við ymiskum orðarað í høvuðs- og eykasetningi:
- Høvuðssetningur: Tove <u>har ikke</u> læst brevet
- Eykasetningur: Dette er brevet, som Tove <u>ikke har</u> læst
- Her hava vit raðfylgjuna har+ikke mótvegis ikke+har

- Føroyskt harafturímóti tykist loyva tveimum orðarøðum í eykasetningum
- Høvuðssetningur: Elin hevur ikki lisið brævið
- Eykasetningur: Hetta er brævið, sum Elin ikki hevur /hevur ikki lisið
- Sum vit síggja: tvinnir møguleikar í eykasetninginum: ikki+hevur og hevur+ikki
- Fyrra útgávan er tann vanligara, men fólk rokna ikki hina at vera ógrammatiska

# Hvat ger munin?

- Onkur hevur sagt, at munurin byggir á dialektmun, soleiðis at orðaraðið “sum Elin hevur ikki lisið” hoyrir til suðuroyar- og sandoyarmál
- Seinni kanningar hava tó avsannað hesa hugsan
- Tær vísa ongan mun millum dialektir

# Munur millum ættarlið?

- Onkur hevur hildið, at munurin er millum ættarlið:
- At tey eldru góðtaka og brúka gamla orðaraðið "sum hevur ikki lisið"
- men at tað ikki er at finna millum tey ungu
- Nýggjari kanningar vísa tó, at sjónskur munur er ikki millum ung og tilkomin í hesum føri
- Bæði ung og tilkomin góðtaka sum heild slíkar setningar, men brúka teir lítið sjálv

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Hvussu er millum børn?

- Kanning av børnum undir skúlaaldur hevur heldur óvæntað víst, at gamla orðaraðið ”sum hevur ikki lisið” er nærum eins vanligt og tað nýggjara millum børn undir skúlaaldur
- Hetta broytist tó, stutt eftir at tey eru farin í skúla

# Kanningin

- Royndirnar við børnunum vóru tvíbýttar:
- Í aðrari royndini skuldu børnini fáast at siga nakað sjálv
- Í hinari skuldu tey siga sína meining um nakrar setningar, sum tey hoyrdu

- Í partinum, har tey skuldu gera setningar sjálv, spurdu børnini spurningar um eina søgu
- Allir setningar byrjaðu við “minnist tú, hví” fyri at fáa fram eykasetningar

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

- Her vísti tað seg, at tey líka gjarna brúktu orðaraðið sagnorð+noktan í eykasetningum, t.d. “minnist tú, hví tey mugu ikki traðka á gólvið?”

- sum noktan+sagnorð, t.d. “minnist tú, hví Pippi ikki svevur sum ordilig børn?”

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Úrslit




FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

- Stabbarnir vísa metingina hjá børnunum av báðum orðarøðum í setningum, sum tey hoyrdu
- Strikumyndin vísir lutfallið av orðaraðnum sagnorð+noktan í setningum, sum børnini sjálv søgdu

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Úrslitini vísa, at tá ið børnini skuldu meta um setningar, var yvirhøvur meiriluti fyri orðaraðnum noktan+sagnorð, og hetta økist týðiliga við aldrinum
- bæði so at orðaraðið noktan+sagnorð verður meira góðtikið (mest í elsta bólkinum)
- og so at orðaraðið sagnorð+noktan verður minni góðtikið (eisini í yngsta bólkinum)
- Tað staðfestir, at styrkin í tí, sum børnini velja framum, veksur við aldrinum

- Í tí, sum børnini sjálv søgdu, høvdu teir báðir yngru bólkarnir (5-7 ár) orðaraðið sagnorð+noktan í meðal í ávikavist 52% og 49% av førunum (”sum hevur ikki lisið”)
- Í elsta bólkinum (9-10 ár) vóru børnini púra avgjørd um bara at nýta orðaraðið noktan+sagnorð (”sum ikki hevur lisið”).

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Dømi um tað, sum børnini søgdu

- Dømi frá børnum í yngsta bólkinum:
- *Minnist tú, hví Pippi ikki dugir at skriva?*
- *Minnist tú, hví Pippi liggur ikki í seingini sum onnur børn?*
- *Minnist tú, hví at Pippi tímdi ikki at vaska gólv?*

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

- Hesi dømi eru úr ávikavist miðbólkinum (2 dømi) og elsta bólkinum (1 dømi):

- *Minnist tú, hví Pippi <u>ikki tímdi</u> at vaska gólv sum hini?*

- *Minnist tú, hví hon <u>liggur ikki</u> rættan veg í seingini?*

- *Minnist tú, hví mamman <u>ikki kláraði</u> at vaska hárið á Henry?*

- Teir báðir yngru bólkarnir vístu einki tekn um, at teir valdu annað orðaraðið fram um hitt
- og heldur eingin ábending var um, at aldur hevði nakra ávirkan millum børn undir skúlaaldur

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

- Mótsett øllum tí, sum væntað var – at børn undir skúlaaldri fóru at vísa færri dømi um sagnorð+noktan – vísa úrslitini í roynd og veru, at børn upp til 7 ára aldur bæði góðtaka og gera munandi fleiri setningar við hesum (gamla) orðarað enn tey, sum eru 9-10 ára gomul.

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

# Samanumtikið

- Tilfarið frá kanningini vísir, at føroysk børn undir skúlaaldur brúka og góðtaka eitt orðarað, sum annars er rættiliga sjáldsamt í vaksnamannamáli
- Tað er undranarvert
- Tað kann hava samband við, at orðaraðið enn ikki rættiliga hevur fest seg hjá teimum yngstu
- og at tað heldur ikki hevur fingið avgerandi týdning í teirra málsliga samskifti

- Tað er eisini møguligt, at foreldur av sínum eintingum sjálv brúka slíkt orðarað av og á og sostatt geva børnunum óbeinleiðis positiv dømi um, at til ber at orða seg á slíkan hátt.

- Nærri kanningar av hesum bíða eftir at verða gjørdar og fara vónandi at varpa ljós á hetta

FRÓÐSKAPARSETUR FØROYA

Takk fyri

FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA